# Reint rock n´

*Hvat dámdi tær konsertina við Shakin' Stevens?*

**Hjalmar Magnussen**



– Mær dámdi konsertina væl. Nógv fólk, góður tónleikur, góðir sangir og góðir tónleikarar. At Shaky ikki er heilt so ungur longur merktist kanska onkutíð, men heildarupplivingin var góð. og hann og hansara menn komu væl frá konsertini. Avgjørt ein góð løta í Tivoli og tað verður tað sikkurt eisini í Klaksvík í summar.

**Jonhild A. Nielsen**



– Stuttligt at hoyra øll tey góðu gomlu løgini aftur. Konsertin var fín og avgjørt nakað sum boðar frá góðum til Summarfestivalin í Klaksvík. Góður tónleikur og væl spældur. Fínt at hoyra gomlu og kendu løgini aftur.

**Neil Joensen**



Konsertin var gín. At hann kanska onkutíð ikki náddi høga C-tónan er ger ikki so nógv, tí hann dansaði og sang fínt, og tónleikararnir vóru góðir, so tað gjørdist ein góð konsert.

**Shakin´ Stevens kann framvegis savna stórar fjøldir av fólki við sínum lætta og svingandi rock n´roll tónleiki. Og við slagarum sum Oh Julie og Marie, Marie megnaði hann eisini at seta lív í miðaldrandi áhoyrarafjøldina, sum eina løtu droymdi seg aftur í kátu ungdómsdagarnar í áttatiárunum**

SHAKIN´ STEVENS
*Orð: Stefan í Skorini*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

**Sosialurin, Keypmannahavn:** Vit eru rættiliga tíðliga á veg til konsertina hjá Shakin´ Stevens. Ætlanin er at fáa ein bita at eta áðrenn konsertin byrjar. Svongdin er farin at níva, so vit skunda okkum yvir til tornið, har vit fáa okkum kinesiska buffet.

Á veg yvir til matstovuna síggja vit eini 20-30 fólk standa frammi við pallin á "plenuni", sum tað verður rópt. Tey hava útgjørt seg við regnskjólum, matpakkum, stólum og myndatólum. Hetta var tveir tímar undan konsertini. Tann harða kjarnan av fjepparum vil eftir øllum at døma ikki lata hendan møguleikan fara aftur við borðinum, nú teirra stóra idol úr áttatiárunum aftur vitjar danska høvuðsstaðin.

Stuttleikaparkin í Keypmannahavn hevur eisini framúrskarandi karmar til eina uttandura konsert. Ljósini frá matstovum og teimum nógvu rusjebanunum veita júst tað rætta huglagið í tí lýggja várkvøldinum. Fínregn kann av og á hómast í ljósinum frá pallinum, men tað nervar ikki fjøldina, sum ikki ætlar lata nakrar dropar spilla eitt gott kvøld.

## Tey eldru settu lív í

Vit, sum vóru smábørn í áttatiárunum, minnast ikki so nøgv til Shakin´ Stevens, men eg minnist væl, at tey eldru systkinabørnini hjá mær ofta lurtaðu eftir Shakin´ Stevens.

Størsti parturin av áhoyrarunum er eisini komin nakað upp í árini, og tey seta óivað tónleikin hjá Shakin´ Stevens í samband við teir glaðu ungdómsdagarnar í áttatiárunum.

Shaky legði ikki so ógvusliga fyri, møguliga fyri at spara krútið til seinni í framførsluni. Men tá hann fyrst spældi Oh Julie við sanginum Marie, Marie beint í hølunum, kom brádliga lív í fjøldina.

Vit komu at standa við síðuna av tveimum lívligum kvinnum, sum nærkaðust teimum fimmti árunum. Tær livdu við í tónleikinum og royndu enntá at fáa meg, ið stóð heldur stívrendur undir liðini á teimum, við í tann heldur margháttliga dansin, sum tær framførdu niðri á vøllinum. Tað sást, at teirra dansikynstur høvdu sæð betri dagar - allarhelst fyrst í áttatiárunum.

Tíbetur stóðu tveir ungir dreingir við hina liðina, sum heldur enn fegnir vildu dansa við hesum báðum kvinnunum - um teir væl at merkja fingu øl afturfyri.

Hetta var eisini mynstrið hetta kvøldið í Tivoli. Tað vóru teir eldru áhoyrararnir, sum settu lív í fjøldina.



## Evergreens

Tónleikurin hjá Shakin´ Stevens hevur ein ella annan løgnan eginleika, sum ger, at hann framvegis selur fløgur og dregur stórar skarar av fólki til sínar framførslur.

Sjálvur sigur hann um sín egna tónleik, at hann er tíðarleysur. Um hetta er rætt, skal eg ikki gera meg klókan uppá, men vit kunnu í øllum førum staðfesta, at hann enn er populerur.

Tað eru nógvir tónleikarar, sum vóru eins væl dámdir í áttatiárunum, men hvørs navn ikki longur kann fylla plenuna í Tivoli.

Shakin´ Stevens spælir rættiliga siðbundnan rock n´roll tónleik við íblástri úr fimmti- og sekstiárunum. Tí er tað í veruleikanum løgið, at hann hevði sítt gjøgnumbrot í áttatiárunum, eitt áratíggju, sum vit vanliga ikki seta í samband við júst hatta slagið av rock n´roll.

## Væl samanspældur bólkur

Tveir av tónleikarunum hava verið við í bólkinum hjá Shakin´ Stevens heilt frá byrjan av fyri fjórðingsøld síðani.

Og bólkurin hjá Shaky legði eina trygga grund undir framførsluni. Ein tónleikari spurdi meg einaferð, um tónleikararnir aftanfyri høvuðspersónin útstrálaðu spæligleði, tá eg greiddi frá einari konsert, eg hevði verið til.

Hesum legði eg meg eftir at bíta merki í hjá Shakin´ Stevens. Og hann hevði ein óvanliga vælupplagdan berskøllutan klaverspælara, sum til tíðir minti um ein klaverboksara úr fimmtiárunum. Eisini hevði hann harmonikuna frammi til fleiri løg.

Saxofon- og trompetspælarararnir vístu eisini sínar dygdir í fleiri løgum. Teir sóu í øllum førum út til at njóta tað at standa á palli við Shakin´ Stevens.

## Trussur á pallinum

Móti endanum av konsertini tekur Shakin´ Stevens eitt lítið plagg upp av pallinum. Tá hann lyftir tað upp og veittrar við tí runt fremstafingur, síggja vit, at onkur av kvinnuligu áhoyrarunum hevur tveitt ein g-strong uppá pallin til Shaky.

"Don´t throw these up on the stage. I´m not Tom Jones", var heldur speiska viðmerkingin hjá Shaky, og hann tveitti púra óimponeraður trussurnar niðuraftur til villastu fjepparanar frammi við pallin. Shaky hevði nógvar kvinnuligar fjepparar í áttatiárunum, men tað er allarhelst ikki eins spennandi hjá honum í dag sum fyri 20-25 árum síðani.

## Endabresturin

Hóast Shakin´ Stevens ikki

